# Berlinmúrurin kravdi fleiri offur enn hildið

**Tvíbýtið av Týskalandi millum 1945 og 1989 kostaði 1.303 fólkum lívið, metir leiðarin av einum savni um Múrin í Berlin, sum eysturtýskarar byrjaðu at byggja júst í dag fyri 47 árum síðani**

SØGA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Talið á deyðsofrum orsakað av tvíbýtinum av Týskalandi undir Kalda krígnum, er nógv hærdi enn higartil hildið. Tað vil leiðarin av savninum um Múrin í Berlin, Alexandra Hildebrandt, vera við.

Sambært almennum keldum doyðu 136 fólk í tíðini frá tí Múrurin varð bygdur í 1961 og til hann fall í 1989. Hildebrandt, sum er leiðari av savninum, sum liggur við fyrrverandi Checkpoint Charlie, heldur, at minst 222 doyðu.

Hildebrandt almannakunngerð tølini í sambandi við 47-ára dagin fyri afturlatingini av markinum millum Eystur- og Vesturberlin. Afturlatingin førdi til Múrin.

Alexandra Hildebrandt heldur haraftrat, at tvíbýtingin kostaði tilsamans 1.303 fólkum lívið um øll offur frá 1945 fram til 1989. Millum hesi offur eru Klemens Hoss, sum druknaði, tá hann royndi at svimja tvørtur um Elbe-ánna 9. oktober 1954, og póllendingurin, Stefan Majura, sum tók lívið av sær sjálvum, eftir at hann varð handtikin 25. august sama ár.

Granskarar krevja, at týsk skúlabørn læra meira um tvíbýtið av landinum.

Sambært einari kanning hjá Freie Universität í Berlin, sum hevur spurt 5.200 ung í fýra landapørtum, vistu bert ein triðingur, at tað var DDR, sum bygdi Múrin. Tað eru tó ikki bert ungu týskararnir, sum eru so óvitandi.

Ein næmingur frá einum handilsskúla í keypmannahavnarøkinum, sum fyrr í ár var á lestrarferð í Berlin, segði á einum kunnandi fundi, at Berlinmúrurin varð bygdur av Vesturheiminum, fyri at halda eysturtýskarar burtur, skrivar berlinske.dk.




*Tað var í 1989, at illa gitni Berlinmúrurin fall*



## Starv á Hagstovuni

Vit sóknast eftir einum dugnaligum fólki til íbúgvahagtøl og arbeiðsmarknaðarhagtøl.

Arbeiðið umfatar bæði rakstur av verandi hagtalsskrá og menning av nýggjum hagtølum um evnini. Nýggju verkætlanirnar fara fram í samstarvi við KT deildina á stovninum.

Tú verður partur av einum stovni, sum hevur informasjón til høvuðsstarv, og tú fært høvi at hava alt verkið um hendi - heilt frá tanka til útgávu.

**Førleikar**

Talan er um fulltíðarstarv, sum krevur analytiskar førleikar, akademiska ella tilsvarandi útbúgving og gott KT skil.

Vit seta tær onga formliga treyt um serliga útbúgving, men gera kortini vart við, at vit hava tørv á væl lærdum og dugnaligum fólki.

- Akademisk útbúgving í hagfrøði ella samfelagsfrøði er ein fyrimunur.
- Góð evni til KT er eisini fyrimunur.

Vit rokna við, at rímiliga rúm tíð fer til at læra stovnin og arbeiðslagið at kenna, at læra um hagtøl og um nýggju uppgávurnar. Tað vit bjóða tær, er eitt áhugavert starv, í samstarvi við dugnaligar og væl vitandi starvsfelagar.

**Umsókn**

Lønin er sambært galdandi sáttmála millum landsstýrið og avvarðandi fakfelag.

**Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 18. august** og kann bæði sendast sum teldupostur og vanligt postbræv.

Vilt tú hava meira at vita um størvini og møguleikarnar, ring so á Hagstovuna – 352800 – og bið um at tosa við Jógvan Bærentsen (fartel.: 581878) ella Hermann Oskarsson (fartel.: 225038).

SENDISTOVAN

HAGSTOVA FØROYA
KVÍGGJARTÚN 1 · POSTRÚM 2068 · FO-165 ARGIR
TLF. +298 35 28 00 · FAX + 298 35 28 01 · HAGSTOVA@HAGSTOVA.FO · WWW.HAGSTOVA.FO